## Týr í Hamburg

Í dag fer Týr á pallin á risa tungmálmsfestivalinum Sweden Rock Festival. Hesa vikuna hevur bólkurin hitað upp við nøkrum framførslum. Mánadagin vóru teir í Hamburg. Týr hava seinasta árið spælt nógv í Týsklandi og aðrastaðni kring Evropa, oftast sum upphiting fyri størri tónleikanøvn. Men tá teir vitjaðu konsertstaðið MarX í Hamburg, vóru teir einasta navnið á skránni. Eini 50-60 fólk vóru komin saman, og sambært heimildarmanni okkara Arna List vóru øll Týr fjepparar. – Tað er stuttligt at standa millum týskarar, sum í fullum álvara royna at syngja tann føroyska tekstin, sum tey kenna so væl av fløgunum, sigur Arne List.



## Stuðul til Lindina

Fíggjarliga grundarlagið undir virkseminum hjá Lindini eru sjálvbodnar gávur. Við víðkaða virkseminum er tørvurin á stuðlum nógv vaksin. Lindin hevur verið virkin í 7 ár, og í hesa tíðina er sendinetið víðkað, fleiri starvsfólk sett, senditíðin longd og ymiskt annað. Leygarkvøldið kl. 19 skipar Lindin fyri einum stuðulskvøldi. Umframt at útvega Lindini fleiri fastar stuðlar, so er eisini ætlanin at savna pening til eina nýggja útvarpsstovu. Hetta skal ætlandi vera triðja útvarpsstovan hjá Lindini.

# Føroya mest fjølbroytta tónleika-tiltak

**Í dag fer Asfalt í luftina. Við 46 framførslum verður Tórsgøta næstu tvey døgnini tann mentanargøtan, ið hon eftir ætlan skal verða. Á skránni er bæði nýtt og gott gamalt**

ASFALT
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Seinasta vikuskiftið byrjaði kappróðrarárið, hetta vikuskiftið byrjar festivalárið. Annað ár á rað verður Tórsgøta karmur um Asfalt, hóast skráin í ár er nakað minnið enn í fjør, so er hugsjónin tann sama, at vísa eina breiða mynd av føroyskum tónleiki í sjálvum hjartanum í høvuðsstaðnum.

### Bert føroyskt

Í mun til hinar festivalarnar setur Asfalt føroyskar tónleikarar og tónleikalívið ovast á dagskránna. Og ongin útlendskur bólkur verður við. Asfalt er eitt átak, at hátíðarhalda og stuðla føroyska tónleikalívinum, og virka framímóti at fáa eitt spælistað. Bólkarnir, ið luttaka fáa onga beinleiðis samsýning fyri at spæla á Asfalt, men ístaðin flytur Asfalt eina upphædd áljóðandi 3.000 DKK fyri hvønn bólkin inn á eina bankakontu, Allur peningurin, ið fer inn á hesa kontu, skal brúkast til at arbeiða víðari við ætlanini um ein tónleika-miðdepil ella spælistað í høvuðsstaðnum.

Henda tilgongd er somikið væl dámd, at 46 bólkar hava avgjørt at luttaka á tiltakinum, og hesir fevna frá Tungmálms bólkum til kristiligar trubadurar, frá kórum til punkbólkar og frá jassi til rokk, bert fyri at nevna okkurt smávegis, ið hendur á teimum fimm pallunum.

Í ár eru tveir uttandura pallar og tríggir innandura pallar. Innandura pallarnir eru í Margarinfabrikkini, í Posthúskjallaranum og á Meijarínum. Meðan teir báðir uttandura pallarnir eru ein stórur til høvuðsnøvnini, og ein minni pallur til ymikst annað.



*Í morgun varð arbeitt við at seta pallarnar upp í Tórsgøtu, ið komandi dagarnar verður karmur um Asfalt.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### At uppliva tónleikapallin

Asfalt er eitt gylt høvi at uppliva, hvat føroyskur tónleikur hevur at bjóða í løtuni. Her eru nógv nýggj og spennandi nøvn, men sanniliga eisini kend og fólkakær nøvn, sosum Martin Joensen, Hanus G. Johansen, Heine Lützen, Magni Christiansen og The Dreams. Stutt sagt, hevur Asfalt okkurt fyri øll. Frá fyrstu tónunum hjá Jumpin' Jack í kvøld kl. 19 til Side Effect fara av pallinum um trý tíðina í nátt, er alla tíðina tónleikur á onkrum palli, og er okkurt sum tær ikki dámar, ber til at fara okkurt annað stað. Tað sama er galdandi frá, at Knocklebusters leggja fyri í morgin kl. 16 til Sic enda tiltakið onkuntíð eftir miðnátt sunnunáttina.

Leygarmorgunin verður eins og í fjør eitt stórt barnatiltak, ið verður hildið á báðum uttandura pallunum við nógvum ymiskum á skránni.

# Kvinnur á Asfalt

**Nógv hevur verið tosað um manglandi kvinnuligu luttøkuna á føroyska tónleikapallinum, og serliga í Prix Føroyum hevur talið av kvinnum verið sera lágt, men á Asfalt eru fleiri spennandi nýggj kvinnunøvn á skránni**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Vit hava longu skrivað um fleri kendar kvinnuróddir, ið verða á Asfalt, so sum Margretha á Rógvu í Brama, Sølva Ford í Ford Siesta, Angelika Nielsen og Sharon Weiss í Kvonn, og einstaklingarnir Lív Hansen, Guðrið Hansdóttir og Rannvá Jacobsen.

Men trý onnur spennandi kvinnunøvn eru Tórfríð Tavsen, Annika Vang og Vígdis. Hetta seinasta navnið er ein tvímansbólkur við Vígdis Fjallstein og Árna Joensen. Vígdis byrjaði sum ein uppgáva til ein einfaldan sang. Hetta hevur síðani ment seg til arbeiði at gera eina fløgu.

Í arbeiðinum við ljóðmyndini hava tey framført til ymisk høvi. Ætlanin er at halda fram við at gera fløgu og at fáa tónleikin út til fleiri áhoyrarar. Intrumenteringin er einføld við sangi og gittara, og tónleikurin er melodiøsur og egin, tó okkurt hissini coverlag eisini stingur seg upp í live-høpi.

Tórfríð Tavsen hevur sungið, síðani hon var smágenta í ymiskum kórum og bólkum. Við sær á pall á Asfalt 2007 hevur hon Dánjal Tavsen, Kára Mikkelsen, Terja Johannesen og Høgna Ole-Jacobsen. Tó framførir hon eisini ofta til ymisk høvi sum einstaklingur.

Annika Vang er eitt rættuliga óskrivað blað á Føroyska Tónleikapallinum. Hóast sín unga aldu smæðist Annika ikki burturímillum. Hon hevur td. spælt konsertir í Losjuni í Gøtu og í Virkishúsinum í Klaksvík. Hesar framførslur hava verið sera væl móttiknar og tað verður áhugavert at fylgja hesi ungu tónlistarkvinnuni í framtíðini.



*Annika Vang er eitt av nýggju kvinnunøvnunum á Asfalt*